## Russiskt herskip nærkast USA

Russiska herskipið »Pætur Mikli« er á veg til Venesuela at vera við í eini sjóvenjing. Hetta síggja amerikumenn sum stuðul til Hugo Chavez, ið ikki er besti vinur við USA. Herskipið er eitt tað mest framkomna í Heiminum, er drivið av kjarnorku og hevur alskyns hernaðarútgerð. Chavez noktar á ongan hátt fyri, at hann ynskir at gera góð sambond við Russland og serliga innan hernaðarvirksemi. Síðani 2004 hevur Venesuela keypt útgerð fyri umleið 20 milliardir krónur úr Russlandi. Russar eru sum heild ónøgdir við ávirkanina USA hevur á heimssamfelagið og ynskja at endurskapa sína støðu á Kuba.



# Nýggi skúlin á Argjum

**Stórur tørvur hevur verið á betri skúlaviðurskiftum í Tórshavnar Kommunu, og á Argjum ganga nógv í barakkum. Ætlanin er so, at næmingarnir, ið nú ganga í barakkunum, skulu byrja at ganga í nýggja skúlanum á Argjum, har dagfesting er lagt til nær klárt skal vera at byrja**



*Eftir ætlan skal nýggi skúlin á Argjum minna um nýggja skúlan á Løgmannabreyt*

*Mynd: Jens K. Vang*

SKÚLABYGGING

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eyka býráðsfundur hjá Tórshavnar Kommunu var í fyrrakvøldið. Eittans mál var á skránni. Nevniliga málið um at byggja nýggjan skúla á Hamrinum á Argjum.

Í eina tíð hevur arbeiði verið gjørt við at byggja nýggjan skúla á Argjum, serliga er málið kent fyri ein spronging, ið var gjørd fyri kortum, tá okkurt ikki gekk eftir vild, og grót fleyg inn í hús í grannalagnum.

Møtt á fundinum vóru allir limir í býráðnum, uttan Bjarti Mohr. Avgerast skuldi, hvussu arbeiðið skuldi fara fram, hvør skuldi byggja og hvat skúlin skuldi kosta.

Á fundinum var avgjørt at skúlin verður bygdur av Articon, og avgjørt var at seta ein fastan prís uppá umleið 146 milliónir, sum er 16 milliónir hægri enn tilboðið Articon bjóðaði og 3 milliónir hægri enn prísmetingin.

### Tvær fasur

Ætlanin er at skúlin skal byggjast í tveimum byggistigum og skal líkjast nýggja skúlanum á Løgmannabreyt.

Fyrsta byggistig skal vera liðugt til skúlabyrjan í næsta ár. Ætlanin er, at næmingarnir í fyrsta til triðja flokki skulu vera í fyrsta stignum.

Í endaliga skúlanum skal tó vera pláss fyri 18 flokkum. Tað vil siga, ein skúli við tveimum breytum við næmingum frá fyrsta til níggjunda flokk.

### Projekteringin samtykt

Á fundinum í fyrrakvøldið vóru seks milliónir setta av til projektering og annað fyrireikandi arbeiði, og málið skal takast aftur til viðgerðar í desemburmánaði.

Fyri at játta peningin vóru øll, ið møtt vóru, uttan Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, ið ikki greiddu atkvøðu.

Sum nevnt, fara bygningarnir at kosta 146 milliónir tá teir verða lidnir, men áðrenn skúlin kann takast í nýtslu, skulu bygningarnir eisini fyllast við hentleikunum, ið krevjast til at nýggjan skula. Tá skúlin verður tikin í nýtslu er ætlanin, at hann skal kosta 191 milliónir krónur.

### Ein alneyðug íløga

Sambært Heðini Mortensen er talan um eina alneyðuga íløgu, sum hevur ligið á láni í 30-35 ár.

- Vit valdu at prioritera á tann hátt, at fyrst skuldi fáast skil á ansingarplássini, síðani skúlarnir og at enda eldra økið. Nú eru vit so við hesum skúlanum og tí á Løgmannabreyt komin nakað ávegis við skúlabygningunum í Kommununi, og hóast hetta er ein stór íløga, er hon alneyðug fyri trivnaðin í býnum, sigur borgarstjórin í Havn.

Høgni Hoydal:

# Vit flyta føroyskan politikk

**Hóast Høgni Hoydal er ónøgdur við at sita í andstøðu, sær hann positivt uppá ávirkanina Tjóðveldi hevur havt á føroyskan politikk og hinar flokkarnar. Serliga leggur hann dent á uttanríkisráðið**

POLITIKKUR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár var samrøða á Rás2 við Høgna Hoydal. Formaðurin í Tjóðveldi er ikki nøgdur við at sita í andstøðu, men er ikki skelkaður av støðuni, tí eftir hansara tykki vil Tjóðveldi ov nógv.



*Formaðurin í Tjóðveldi er ónøgdur við at sita í andstøðu, men metir, at øll stríð hjá Tjóðveldi geva úrslit*

- Tað sum hevur verið høvuðsmálið í CHE-samgonguni og eisini í undanfarnum samgongum, er at fáa broytt hetta samfelagið, so at vit fáa sjálvstøðugt land og eitt sjálvstøðugt samfelag, sum hevur ein vinnupolitikk, sum er altjóða kappingarførur, og sum ikki minst hevur eina útbúgvingarskipan og eina sosiala skipan, sum kemur teimum sum tørva tí; mest til góðar. Tað er kanska tað sum ger, at nógvir av teimum samanhangum vit hava verið í ikki ganga. Vit skulu endurskoða okkum, men vit hyggja at teimum politiskum málunum, og mugu bara ásanna, at tað vilja teir samstarvsflokkar vit hava gjørt avtalur við ikki fremja. Tað er orsøkin til, at bæði hendan og undanfarna samgonga fór í úrtíð. Mann torir ikki at taka tey veruligu tøkini, sum skulu til fyri at samfelagið verður flutt á tann bógvin, sum okkara hugsjón ynskir, sigur Høgni Hoydal.

### Blokkurin

Sum skilst eru konkretar ætlanir um blokkniðurskurð í samgonguskjalinum. Hetta sær Høgni Hoydal, sum nakað positivt, hóast hann ikki skilur, at Fólkaflokkurin gongur við til ein so lítlan niðurskurð.

- Hetta vísir, at arbeiði vit stríðast fyri flytur føroyskan politikk. Fyri fáum árum síðani var ógjørligt at fáa Sambandsflokkin at tosa um blokkstuðulsniðurskurð, og nú er tað møguligt at tosa um tað, staðfestir Høgni Hoydal.

### Uttanríkisráðið

Tað er ongin loyna, at Jóannes Eidesgaard var ónøgdur við at skula av við Uttanríkispolitikk, tá CHE-samgongan varð skipað. Eisini hava flokkar av og á verið eftir Uttanríkisráðnum, men sum skiltist í gjáramorgunin hevði Uttanríkisráðið nógv at siga fyri samráðandi partarnar. Hetta hevur Høgni Hoydal eisini eina meining um.

- Um vit taka Uttanríkisráðið, sum hevur verið húðflett og morlað niður, av øllum trimum flokkunum, sum nú sita í samgongu. Nú bleiv tað kanska tað mest áhugaverda økið, eisini hjá hesari nú undirskrivaðu samgonguni. Tað var kanska tað økið, sum flokkarnir kappaðust mest um at fáa fatur á. Og tí kunnu fólk spyrja seg sjálvi, hvat tað er sum flytur føroyskan politikk. Vit vita væl í Tjóðveldinum, at nógv av teimum málunum vit seta okkum mugu vit stríðast fyri, og tá stríðini eru vunnin taka øll undir við teimum. Tað sum skilur okkum í dag, tað savnar okkum í morgin, greiðir Høgni Hoydal frá.

Formaðurin í Tjóðveldi leggur afturat, at flokkurin í andstøðu fer at arbeiða við at endurbyggja trúvirðið, sum seinasta tíðin hevur tikið frá flokkinum.